Studentar í Hoydølum:

## *Leið okkum ikki í freistingar…*

**Seinastu seks mánaðirnir hava 26 miðnámsskúlanæmingar luttikið í norðurlendskari verkætlan um ungdómsmentan. Endamálið hevur verið at upplýsa, kunna og fyribyrgja um teir vandar, sum ung standa andlit til andlits við**

# 4-oyggjaverkætlanin



**Oyggjasamfeløgini Føroyar, Ísland, Áland og Grønland hava seinastu 2 árini gjøgnum Norðurlandaráðið verið saman um eina verkætlan. Endamálið við verkætlanini er at greina tað mentanarligu bakgrundina fyri rúsevnis- og rúsdrekkanýtsluna hjá miðnámsskúlanæmingum. Eisini skal verða mett um ávirkanina av teimum skráum, sum skulu fyribyrgja misnýtslu av rúsevnum/rúsdrekka og meta um fatanarligar (kognitivar) og kensluligar tilgongdir, ið er knýttar at rúsevnis- og rúsdrekkanýtsluni**

VERKÆTLAN
*Barbara Thomsen og Iris J. T. Thomsen*

### Fyriskiparar

Verkætlanin er komin í lag gjøgnum norðurlendskt samstarv. Í Føroyum er tað Fyribyrgingarráðið, sum hevur ábyrgdina av føroyska partinum. Fyribyrgingarráðið hevur til uppgávu at styrkja tiltøk fyri heilsufremjan, sjúku- og vanlukkufyribyrging og tað bæði í almanna- og heilsuverkinum. Ráðið hevur aftur at hesum sum uppgávu at stimbra gransking og royndir á fyribyrgingarøkinum.

Brynhild Danielsen, skrivari á Fyribyrgingarráðnum, og Carl August Arge, rúsevniskonsulentur, hava dagligu umsitingina av verkætlanini.

### Luttakarar

Næmingarnir, ið taka lut í granskingar-verkætlanini eru millum 17-22 ár og eru tey 25 í tali. Men tó er henda verkætlan soleiðis háttað, at tað ikki bert eru útibúgvandi næmingarnir, sum taka lut. Allir FHS- og studentaskúlanæmingar á fyrsta ári fingu við skúlaársbyrjan eitt umfatandi spurnarblað at fylla út, og fáa teir aftur eitt, tá ið eitt hálvt ár er umliðið.

### Verkætlanin í Føroyum

Endamálið við granskingarverkætlanini hjá Norðurlandaráðnum er at meta um árini av tiltøkum, ið skulu fyribyrgja misnýtslu av rúsandi evnum. Samstundis miða tiltøkini ímóti at menna tey ungu í sínámillum samstarvi og at læra tey at kenna sínar sterku síður og virða síni egnu mál og virðir. Hesin parturin umfatar 10 tímar og byrjaði beint eftir heystfrítíðina. Tey luttakandi eru øll útibúgvandi, tí kanningar í útlondum benda á, at útibúgvandi ung eru í størri vandabólki, tá talan eitt nú er um rúsevnir.

Í Føroyum hevur arbeitt verið í bólkum, sum hava fingið heitið "Oyggjabólkarnir". Tveir bólkar eru á hvørjum skúla og ein lærari er knýttur til hvønn bólkin. Allir bólkarnir hava haft bólkafundir og hava harumframt verið til fyrilestrar:

- Um rúsevni (Carl August Arge)
- Um fyribyrging - eisini kensluliga (Karin Dahl)

Bólkarnir á Handilsskúlanum hava síðani arbeitt við kriminaliteti, ungdómsmentan og -samleika og fíggjarviðurskifti í samband við at flyta heimanífrá.

Í Hoydølum valdi tann eini bólkurin at skriva um verkætlanina. Vitjað hevur verið úti á Sosialinum, har Páll Johannesen vísti runt og greiddi frá blaðmannastarvinum og um greinaskriving. Hin bólkurin hevur fyrireikað námsferðina.

### Námsferðin

Oyggjabólkaverkætlanin endaði við eini námsferð. Henda ferðin var frá 8-12 mars, og fóru næmingarnir tá við fyriskiparunum og lærarunum til Íslands. Búð var í íbúðum mitt í Reykjavík.

Vit vitjaðu næmingar á sama útbúgvingarstøði í Reykjavík, góvu sínámillum frágreiðingar um útbúgvingarmøguleikar í teimum báðum londunum og gjørdu samanberingar millum útbúgvingarnar. Eisini samanbóru vit frítíðarumhvørvið hjá íslendskum og føroyskum ungdómi og áhugavert var at koma í samband vit ung í Íslandi. Ein vitjan í einum virknum ungdómshúsi var eisini á skránni. Um kvøldið vóru vit boðin til rokk konsert har. Harumframt vóru vit í Foreldrahúsinum mitt í hjartanum í Reykjavík, sum er ein sjálvboðin felagsskapur av foreldrum. Foreldrahúsið verður stuðlað av býráðnum í Reykjavík og vinnulívinum. Her fáa børn og foreldur ráðgeving og hjálp í samband við rúsevnismisnýtslu.

Tá ein er í Íslandi, ber ikki til at fara avstað aftur uttan at hava sæð okkurt av tí, sum Ísland hevur at bjóða. So mikudagurin var settur av til tílíkt. Tá var t.d farið at hyggja at Bláa Lóni og Reykjanes. Tann ætlaði túrurin til Geysir var avlýstur vegna harðveður.

Fríggjadagin kundu næmingarnir fara sær ein túr í handlar ella okkurt annað, tí hendan dagin høvdu vit "frí" eftir at hava mett um verkætlanina fyrrapartin. Farið var aftur til Føroyar fríggjakvøldið. Samanumtikið ein spennandi og ikki minst stuttligur túrur.

### Ráðstevna í Føroyum

Norðurlendska verkætlanin endar í Føroyum við eini ráðstevnu komandi heyst, har granskingarúrslitini verða viðgjørd. Tá vera umboð fyri hini luttakaralondini eisini við.

### Bygnaðurin í verkætlanini

1. Spurnaðarblað til allar næmingar í 1. flokkum í Studentaskúlanum í Hoydølum og á Handilskúlanum í Havn á heysti 2003.
2. Oyggjabólkarnir samansettir av útibúgvandi næmingum og einum lærara í hvørjum bólki hava bólkavirksemi, ið byggir á upplýsing, samstarv og tilvitan. Virksemið er frá oktober 2003 til mars 2004.
3. Spurnaðarblað til allar næmingar í 1. flokkum í Studentaskúlanum í Hoydølum og á Handilsskúlanum í Havn á vári 2004.

Lesið meira á næstu síðu

# Kunningartørvur um fyribyrging

**Tá spurningurin snýr seg um fyribyrging, eru føroyingar ikki eins væl kunnaðir um fyribyrgingarhættir, valmøguleikar og avleiðingar sum t.d. danir. Kanning vísir at ung í Føroyum halda seg ikki vera nóg væl kunnaði á hesum øki. Hvussu fæst kunning um fyribyrging og hvør eigur at kunna um hetta?**

FYRIBYRGING
*Brynjálvur Niclasen og Eyðbjørn Mouritsen*

Fyribyrgingar - eingin heilt sikkur.

Tá evni snýr seg um kynsligt samband, noyðist ein sjálvur at duga at seta mørk. Ein ræður sjálvur yvir sínum egna kroppi, og hevur tí sjálvur ábyrgd av at verja seg ímóti sjúkum og graviditeti. Fyrbyrgingarmøguleikarnir eru nógvir, nevnast kann: hít, p-pillarar, pessar og umframt hesar eru nógvir aðrir fyribyrgingarhættir, sum flest okkara ikki kenna til. Eitt dømi kann vera eitt plástur, ið setast kann á armin, eins og nikotinplástur, og gevur sama úrslit sum p-pillarar (riggar í 3 vikur). Av tí at har eru so nógvir fyribyrgingarmøguleikar, verður hvørt úrslit ikki tað sama. Nevnast skal, at onkrar fyribyrgingar krevja læknaváttan, og læknin kann tá kunna um fyrimunir og vansar av tí einstøku fyribyrgingini. Tá kynsligt samband fer fram, er ongin fyribyrging tó 100% trygg.

### Stovnur manglar

Tað er ikki rætt, at tað einans skal upplýsast um fyribyrgingarmøguleikar í fjølmiðlunum, tí samfelagið eigur at kunna fólk um hetta á alskipaðan hátt. Ein stovnur átti tí at verðið settur á stovn í Føroyum, sum tann einstaki kann seta seg í samband við, um tørvur er á kunning innan hesi øki. Møguleikin er sjálvandi hjá børnum og ungum at spyrjga onkra heilsusystur um ráð, tí heilsusystrarnar umsita hetta øki í fólkaskúlunum runt landið. Tær røkja hetta arbeiðið til lítar, sjálvt um har kanska ikki verður feiða heilt reint - runt umkring í krókunum. Víðbrekið er evnið sexualitetur, og er í stóran mun tengt at tabu. Tú skalt kenna ein persón sera væl, fyri at kunna tosa um slíkt, ella skalt tú als ikki kenna persónin. Heilsusystrarnar liggja her mitt ímillum.

Undir hvørjum leisti skal kunningin so í framtíðini fara fram? Hvør skal hava ábyrgdina av upplýsingini?:
1. heimið?
2. kirkjan/samkoman?
3. skúlin?
4. ein nýggjur stovnur?

### Danmark ein fyrimynd

Í Danmark er t.d. stovnurin "Sex og samfund", ið kunnar almenningin gjøgnum alnótina og telefonina um: seksuellar trupulleikar og spurningar, fyribyrging, kynsligar sjúkur, graviditet, angribollar, fosturtøku o.a.

– Ein tílíkan stovn eiga vit eisini at hava.

### Fakta

Kanning millum næminar úr 1. studentaflokkum og FHS- flokkum í Havn vísir, at tey flestu halda ikki kunningina, sum tey fáa gjøgnum árini, vera nøktandi. Tískil má okkurt gerast við hendan óloysta trupulleikan, ein nýggj og betur skipan átti at verðið sett í brúk. Ein stovnur sum áður nevndi er ein gongd leið.

# Fleiri flyta heimanífrá

**- prát við 2 gentur, ið eru útibúgvandi**

UNG
*Barbara Thomsen og Iris J. T. Thomsen*

Samfelagið er soleiðis háttað í dag, at einum tørvar eina góða útbúgving fyri at fáa tað arbeiðið, ið ein kann hugsa sær. Eftir at hava lokið fólkaskúlan, eru tað hvørt ár fleiri ung, ið flyta heimanífrá at ganga á miðnámsskúla.

Tá ið ein flytur heimanífrá fær ein eina ávísa ábyrgd fyri sær sjálvum, ein hugsar meira um egin viðurskifti enn áður.

Vit hava í hesum sambandi tosað við Olgu Mariu undir Skarði og Anitu í Soylu, ið báðar ganga á øðrum ári í studentaskúlanum og búgva í Studentaskúlaheiminum á Berjabrekku.

Olga er 19 ára gomul og kemur heiman av Sandi. Anita er 18 ára gomul og kemur úr Sandavági.

*Hví hava tit valt at flyta heimanífrá?*

Olga: Eg valdi at flyta til Havnar, tí at skúlin liggur í Havn.

Anita: Orsøkin til at eg flutti var, at skúlin liggur í Havn og eingin undirsjóvartunnil var komin, tá ið eg byrjaði. Eftir hetta treivst eg væl her.

*Fyrimunir við ikki at búgva heima?*

Olga: Eg haldi at ein av fyrimununum er at ein er rættuliga fríur, kann gera alt hvat ein vil, eisini eru nógvar nýggjar avbjóðingar. Ein lærir at gera mat, hehe... ein lærir eisini at standa á egnum beinum og er ikki undir "uppsýni" allan dagin.

Anita: Eg eri samd við Olgu. Ein hevur ábyrgdina av sær sjálvum.

*Vansar við ikki at búgva heima?*

Anita: Pengapungurin er skrallaður í endanum av mánaðinum, eingin morgunmatur á borðinum tá ein vaknar.

Olga: Ein fær ikki døgurða hvønn dag, hehe... Tað at koma upp hvønn morgun, tað er lættari at koma upp tá onkur er har og biður ein koma upp. Hevði eisini havt minni fráveru, um ein var heima.

*Hvussu er tykkara peningaliga støða?*

Olga og Anita: Tronglig!

*Hvussu nógvan studning fáa tit um mánaðin?*

3418kr

*Fáa tit pening heimanífrá?*

Foreldrini gjalda kamarið

*Hava tit arbeiðið í frítíðini? Hvussu nógv gevur hetta um mánaðin?*

Olga: Nei tað havi eg ikki.

*Anita: Ja. Eg fái umleið 2000 kr og tað fer til námsferð.*

*Hvussu nógvan pening nýta tit um mánaðin?*

Olga og Anita: Alt.

*Hvat nýta tit peningin til?*

Olga og Anita: Tað brennur upp í lummanum. Annars mat og klæðir, vanliga húsarhaldsvøru.

*Hvussu eru tykkara bústaðarumstøður?*

Olga: Fínasta slag. Egið kamar og wc.

Anita: Sera gott sosialt, nógvar nýggjar vinir, gott samanhald millum búfólkið. Týpist ungdómshús, órudduligt.

*Hvat gera tit í frítíðini?*

Olga: Tá ið ein gongur í 2.s er eingin frítið. Næstan øll frítíðin fer til heimaarbeiðið, tá eg ikki geri hetta, lesi eg nógv. Eisini eri eg har suðuri onkur vikuskifti.

Anita: Tað er ikki nógv frítíð, men annars nýti eg ikki frítíðina til nógv annað enn at hyggja í sjónvarp. Men so eri eg eisini ofta har vesturi.

*Meta tit, at tit nýta nóg nógva tíð til heimaarbeiðið?*

Olga og Anita: Heilt avgjørt!! Brúka sera nógva tíð og orku til heimaarbeiðið.

*Kenna tit tykkum meira einsamallar nú enn áður?*

Anita: Sjálvandi kennir ein seg einsamallan, tá ein situr í einum kamari og ger skúlating! Men eftir sum at her búgva 15 onnur ung, so er tað ofta lætt at finna onkran annan, sum eisini keðir seg. Og so kann ein sita og práta við tey.

Olga: Eg føli meg ikki meira einsamalla enn áður, sjálvandi er tað sera gott at vera heima, blíva hjúklaður um av foreldrunum. Men eg føli meg ikki einsamalla inni í kamarinum. Viðhvørt kann tað vera einsligt, men eg fari ofta út í stovuna tá. Mær dámar sera væl at vera einsamøll, so tað er eingin trupulleiki. Um ein dugur at undirhalda sær sjálvum, skuldi tað ikki verið nakar trupulleiki, hehe...